- Hóast áðurnevnda fría rák í Hollandi av útlendingum mangan er yvirdrivið, gevur hollenska samfelagið tó rúm fyri fríum atburði, men er hetta bert eitt tekin um eitt modernað og búgvið fólk, har sýnt verður, at vaksin eisini búgva í landinum, sigur hollendski sendiharrin, Hans Førster, sum í hesum døgum vitjar í Føroyum

Hollendskur sendiharri:

– Fría Holland er framkomið og búgvið

- Hóast tað mangan verður gjørt alt ov nógv av í lýsingunum av Hollandi sum heilt fríum og góðtakandi mótvegis rúsevnum, prostitutión og øðrum, umboðar Holland eitt liberalt rák, og er hetta tekin um eitt framkomið og búgvið samfelag, har løgreglan ikki stendur á hvørjum horni og noyðir fólk at liva á ein ávísan hátt, sigur hollendski sendiharrin í Keypmannahavn, Hans Førster, sum saman við 25 øðrum sendiharrum vitjar í Føroyum í hesum døgum

SAMRØÐA
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Í hesum døgum vitja heili 25 sendiharrar við maka í Føroyum úr øllum heraðshornum í heiminum, og við dyrnar á Hotel Føroyum var eitt ikki sørt multietniskt ferðalag at síggja, tá sendiharrar úr Europa, Suðuramerika, Asia og Afrika trinu inn á føroyska hotellið uppi í Marknagili.

Sosialurin fekk orðið á hollendska sendiharran, Hans Førster, sum hevur nógv ár á baki í hesum starvi í Keypmannahavn, og snúði prát okkara seg í stóran mun um fría hollendska samfelagnum, samstarvsmøguleikarnar landanna millum og hansara fatan av Føroyum.

Holland liberala flaggskipið

Tað er ein sannroynd, at mong í stóran mun seta Holland í samband við eitt sera frítt og opið samfelag. Verða staðarnøvnini Holland og Amsterdam nevnd, verður hetta ofta knýtt at skøkjuvirksemi, fríari rúsevnisnýtslu og rúsevnissølu, aktivari deyðshjálp, høgum tali av samkyndum, Red Light District o.s.fr.

Á henda hátt er landið í útlendskum eygum ímynd-in av liberala samfelagnum, har moralsku mørkini og virðini eru flutt og broytt samanborið við fleiri onnur lond. Hollendski sendiharrin, Hans Førster, hevur tó ikki somu áskoðanir um heimland sítt.

- Sum hollendskur sendiharri fái eg javnan spurningar um Holland, sum hevur legaliserað rúsevnisnýtslu og líknandi virksemi, og hóast landið umboðar eitt liberalt rák, eru hesir pástandir beinleiðis ósannir, vísir Hans Førster á.

Munurin á teori og praksis

Í afturvísingum hansara av hesum eyðkennum hollendinga vísir Hans Førster fyrst og fremst á ósannindunum søgdum um lógirnar í Hollandi.

- Tað er einki minni enn ein myta, at hollendsku lógirnar ikki forbjóða rúsevnissølu og rúsevnismisnýtslu. Vit hava í Hollandi eins lógir og í grannalondunum, og tískil er tað ikki rætt, at Holland loyvir hesum, eru avgjørdu áskoðanir sendiharrans.

Spurdur, hví ferðafólk javnan vísa á fríu hassjsøluna í Hollandi, hví skøkjulív tykist vera so sjónligt í t.d. Amsterdam, hví fleiri eru opinlýst samkynd í Hollandi enn aðrastaðni, og hví Holland sum heild hevur hetta vørumerkið, ger Hans Førster mun á, hvat er loyvi, og hvat verður tolererað.

- Í Hollandi er tað so, at um ein hevur smáar nøgdir av veikaru ella lættaru rúsevnunum, verður tað góðtikið, uttan at lógin rættvísger hetta. Um tú koyrir 122 km/t á motorvegnum í Danmark, meðan hámarkið er 120 km/t, verður tú av praktiskum orsøkum ikki tikin og dømdur av løgregluni, tí so skulu tey flestu handtakast av eini rúgvu av løgreglumonnum. Á henda hátt er talan um júst tað sama í Hollandi og øllum øðrum londum, tá tað kemur til rúsevni, sigur Hans Førster.

Hollendski sendiharrin leggur afturat, at hóast samfelag hansara loyvir fríum atburði, hava nógv leysatíðindi um Holland ikki hald í veruleikanum.

- Í praksis verður tað góðtikið av løgregluni, at lítlar mongdir av løttum rúsevnum verða nýttar av privatpersónum, og hetta er galdandi fyri onnur lond eisini, men tað er sanniliga ikki tí, at lógin er so, sigur Hans Førster.

- Prostitutión fer avgjørt ikki fram í størri nøgdum í Hollandi enn aðrastaðni, men munurin er, at tað er sjónligari og meiri skipað í felagsskapum í stórbýum, sigur Hans Førster. Í einum tolerantum umhvørvi gerst hetta tískil meiri opinlýst, og dregur hetta eisini fleiri ferðafólk til Hollands, leggur sendiharrin úr Hollandi dent á.

Modernisering og búnaskapur

Hans Førster viðurkennir sostatt, at Holland umboðar nakrar fríar tendensir, men hetta er sambært honum heldur ein styrki enn ein veikleiki.

- Hóast áðurnevnda fría rák í Hollandi av útlendingum mangan er yvirdrivið, gevur hollenska samfelagið tó rúm fyri fríum atburði, men er hetta bert eitt tekin um eitt modernað og búgvið fólk, har sýnt verður, at vaksin eisini búgva í landinum, sigur Hans Førster.

Tað, at løgreglan ikki stendur á hvørjum horni og lærir fólk, hvussu tey skulu bera seg at, er sambært sendiharranum ein menningarandi og positivur eginleiki hjá einum samfelagi.

Spurdur, hvat hann í hesum føri sipar til, tá hann nevnir Holland sum liberalt, nevnir hann prostitutión og rúsevnisnýtslu sum sjónligari enn aðrastaðni, hóast alt ikki er lógligt.

- Men hóast tað er meiri opinlýst millum almenningin, merkir tað ikki, at minni virksemi av hesum slag fer fram aðrastaðni, sigur Hans Førster. Víðari vísir hann á, at hetta rák í stóran mun er tengt at ávísum plássum í stóru býunum, og tískil er talan ikki um nakað landsumfevnandi rák.

Nýtt og gott gamalt

Sum sagt tekur Hans Førster frástøðu frá tí áskoðan, at Holland við opnum ørmum fagnar øllum nýggjum og liberalum virksemi, sum í stóran mun er tabu í meiri siðbundnum samfeløgum.

- Holland er eisini eitt samfelag við siðbundnum virðum og siðum, og søgan hevur stóran týdning fyri fólkið. Í okkara varðveitan av góðu, gomlu virðunum, modernisera og broyta vit eisini, so talan verður um eina sunna kombinatión á leiðini móti einum betri samfelagi, vísir Hans Førster á.

Holland er sambært honum á mongum økjum frígjørdari enn onnur lond, men ikki so liberalt, sum fólk mangan spyrja hollendska sendiharran um.

- Prostitutión fer avgjørt ikki fram í størri nøgdum í Hollandi enn aðrastaðni, men munurin er, at tað er sjónligari og meiri skipað í felagsskapum í stórbýum, og í einum tolerantum umhvørvi gerst hetta tískil meiri opinlýst, leggur sendiharrin úr Hollandi dent á

Fría samfelagið gott fyri ferðavinnu

Stóri spurningurin er, hvørjar avleiðingarnar av hesum ráki eru, og í tí sambandi vísir Hans Førster fyrst á eina positiva avleiðing fyri landið.

- Áðurnevndi eginleiki í Hollandi, sum í stóran mun er yvirdrivin, dregur fleiri ferðafólk til landið, tí hetta er lokkandi fyri mong, sigur Hans Førster. Sambært hollendska sendiharranum hótta tó eisini skaðiligar avleiðingar av hesum, tí við ov fríum og sjónligum virksemi av hesum slag kann úrslitið gerast skipaður kriminalitetur, og er hetta ein hóttan í øllum fríum samfeløgum, sum stjórnin roynir at fyribyrgja.

- Í løtuni er politiskt kjak í Hollandi um veikastu rúsevnini, t.d. hassj, skal legaliserast, so privatpersónar kunnu hava loyvi at nýta hesi evni, men tað er ikki samtykt enn, sigur Førster.

Samanumtikið heldur hollendski sendiharrin, at talan er um eina misskiljing, tá borið verður fram, at rúsevnisnýtsla er løglig í Hollandi, tí tað er hon ikki. Tó viðurkennir hann eitt frítt og opið rák, sum stjórnin tó hevur tamarhald á, og sum er positivt, so leingi tað ikki brýtur lógarinnar karmar í ov stóran mun.

Shell, Philips og Kloosterboer

Spurdur, á hvønn hátt føroyska og hollendska samfelagið í framtíðini kunnu samstarva, vísir sendiharrin á nøkur ítøkilig dømi.

- Hóast vit ikki eru vinnuligir høvuðssamstarvsfelagar, eru nøkur felagseyðkenni landanna millum, og fleiri hollendskar fyritøkur eru aktivar her á landi, vísir Hans Førster á.

Sum dømi nevnir hann Shell, sum hollendarar eiga 55% í, og umframt hetta er Philips ein fyritøka, sum hevur ein góðan markna í Føroyum. Stóra frystifelagin hjá Kollafjørð Pelagic, Kloosterboer, er eisini eitt dømi um føroyskt og hollendskt samstarv, hóast hetta er ein sera lítil fyritøka samanborið við Shell og Philips.

Mennið ferðavinnuna!

Hetta er aðru ferð, at hollendski sendiharrin í Keypmannahavn vitjar føroyingar, og á hesum túrinum hevur mest áhugaverda upplivingin verið á fiskivinnuøkinum.

- Vit hava vitjað ymisk virki og sæð, hvussu føroyingar í praksis virka fiskin til lidna vøru at selja, og higartil hava vit fingið fatan av eini sera framkomnari og modernaðari skipan.

Umframt hetta er ein boðskapur hansara til føroyska vinnulívið teir óendaligu møguleikar, landið hevur á ferðavinnuøkinum.

- Hóast tað helst ikki er nøkur nýggj hugsan, eg komi við, eigur hetta landið at leggja dent á at menna ferðavinnuna, tí tit hava sera nógvar møguleikar á goymslan og samstarvshesum øki, sigur Hans Førster. Við stórslignu náttúruni, friðarliga umhvørvinum og avmarkaða fólkatalinum snýr tað seg sambært sendiharranum bert um at marknaðarføra landið á rættan hátt, so onnur vinnugrein eisini kann supplera einaráðandi fiskiidnaðin.

- Stórbýaríbúgvum dáma friðarlig umhvørvi, har ein kann taka sær av løttum, og tað er júst tað, føroyingar kunnu bjóða ferðafólkum sínum, og persónliga dámar mær sera væl á oyggjum tykkara, eru seinastu orðini frá hollendska sendiharranum á vitjan í Føroyum, Hans Førster.

Um vit skulu taka liberala hugburð hollendinga til okkum fyri at økja um ferðavinnuna her á landi, skal allarhelst ein minni kollvelting til, og tað sigur søgan so einki um...